# Leiðari til Bókamiðsøluna

***Við hesum verður søkt eftir leiðara til Bókamiðsøluna Starvið verður sett 1. august 2002***

**Uppgávur**
Endamálið við Bókamiðsøluni er at vera millumlið millum føroysk forløg og bókasølu í Føroyum og uttanlands. Leiðarin hevur dagligu ábyrgdina av hesum virksemi. Leiðarin hevur fíggjarligu ábyrgdina mótvegis nevndini og er nevndarskrivari. Tað áliggur eisini leiðaranum at menna stovnin.

**Førleikakrøv og royndir**
Umsøkjarar eiga at hava útbúgving innan skrivstovuyrki ella aðra viðkomandi útbúgving. Umsøkjarar við royndum innan fyrisiting og leiðslu hava fyrimun.

**Persónlig førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu kunna arbeiða sjálvstøðugt, duga at skipa fyri, vera miðvísir og hava góð samstarvsevni.

**Vit kunnu bjóða**
Talan er um eitt sjálvstøðugt starv, har dagligt samskifti er við eitt nú forløg, skúlar og bókhandlarar.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Møguligir umsøkjarar eru væl komnir at seta seg í samband við Niels Jákup Thomsen, nevndarformann, á tlf. 317644, at hoyra meira um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, CV og møguligum viðmælum skulu sendast:

**Bókamiðsølan**
Att.: Niels Jákup Thomsen
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

og skulu vera Bókamiðsøluni í hendi í seinasta lagi á middegi mánadagin 27. mai 2002.

*Bókamiðsølan er millumlið millum føroysk forløg og bókasølu í Føroyum og uttanlands. Bókamiðsølan verður rikin sambært viðtøku, sum Føroya Landsstýrið góðkennir. Í nevndini fyri Bókamiðsøluna eru eitt umboð fyri Føroya Skúlabókagrunn, Føroya Lærarafelag og Føroya Landsstýrið. Trý fólk starvast á Bókamiðsøluni. Heimasíða: www.bms.fo*

# Hví egna við hond?

Tá mest framkomna egningarmaskina, ið egnur uppí stampar er komin á marknaðin, og hon egnur 2500 húkar um tíman, klipsar á tá hon egnur, og av tá hon dregur, ongin luktur av gomlum agni, í stampinum.

Ynskir tú meir at vita um hesa, sum egnur 28 stampar uppá 3,5 tímar, so set teg í samband við Føroyska umboðið:

**HWH-Maritime**
v/ Høgni Waag Høgensen
FO-650 Toftir
Tlf. 449641 ella fartlf. 223811
E-mail: hwh@post.olivant.fo

# Starvsfólk

## til barnagarðin í Hvalvík

**Hvalvíkar kommuna byggir ein nýggjan barnagarð í Hvalvík, har pláss verður fyri 45 børnum í aldrinum 0-7 ár. Ætlanin er, at stovnurin letur upp 01. oktober 2002, tó við fyrivarni fyri møguligum seinkingum. Í hesum sambandi verður søkt eftir starvsfólki.**

**Leiðari**
**Høvuðsuppgávur:**
- At hava leiðsluna og ábyrgdina av stovninum
- At samskipa arbeiðið á stovninum
- At skapa trivnað á stovninum

**Vit sóknast eftir persóni, ið:**
- Kann ganga á odda og dugir væl at fyrisita/leiða
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- Kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar, foreldur og myndugleikar
- Er opin fyri nýhugsan

**Útbúgving/royndir:**
- Námsfrøðiliga útbúgving

Royndir innan leiðslu og umsiting kunnu vera ein fyrimunur.

**Lønar- og setanarviðurskifti:**
Eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala arbeiðsgevarafelag.

Starvið verður at seta skjótast gjørligt.

**Starvsfólk:**
Eisini verður søkt eftir pedagogum hjálparfólkum.

**Vit sóknast eftir persónum, ið:**
- Eru fleksiblir
- Hava opið sinni
- Taka støði í barninum
- Taka barnið í álvara
- Leggja stóran dent á eitt gott samstarv við foreldur og samstarvsfelagar.

**Lønar- og setanarviðurskifti:**
Eru sambært sáttmálan millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum seinkingum, og verða størvini sett frá hesum degi.

Meir fæst at vita við at venda sær til kommunuskrivstovuna, telefon 422350.

Umsóknir saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Hvalvíkar Kommunu, 430 Hvalvík, í hendi í seinasta lagi 24. mai.

**Hvalvíkar kommuna**

# Urtagarðsarbeiði

Vit gera alt urtagarðsarbeiði.

**Fa. Urtagarðsrøkt**
**v/ Mass Jensen, Nólsoy**
Tlf. 32 71 31 – 28 39 53

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Plantið eitt træ 2002**

Í Kollafirði verða plantupakkarnir útflýggjaðir á parkeringsøkinum við Kollafjarðar skúla leygardagin 11. mai 2002 millum 10.00-12.00 ella til uppi er.

SNARSKIVAN

# Starvsfólk

**1 pedagogur og 2 hjálparfólk til Frítíðaransingina í Runavíkar kommunu**

**Søkt verður eftir:**
1 pedagogi at arbeiða 20/25 tímar um vikuna
1 hjálparfólki at arbeiða 20 tímar um vikuna
1 avloysara fyri hjálparfólki í barnsburðarfarloyvi at arbeiða 20 tímar um vikuna (24 vikur).

**Vit bjóða**
Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum. Dentur verður lagdur á at veita børnunum eitt trygt og mennandi frítíðartilboð.

**Vit ynskja**
At umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt. Er kreativ/ur, hevur góð samstarvsevnir og hevur hug at arbeiða við børnum

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett 14. august 2002. Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn, saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving, skal verða Barnaansingini í hendi í seinasta lagi 31. mai 2002.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Leilu Weihe á tlf. 448594 lok. 12 ella 256930.




**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur
600 Saltangará

# Frá Fa. Urtagarðsrøkt

Vit hava maskinur til velting og annan grevstur.

Vit hava amboð til flutning av mold og øðrum tilfari, har vanlig akfør ikki sleppa framat.

Eisini laða vit garðsløg úr hagagróti.

**Fa. Urtagarðsrøkt**
v/Mass Jensen
tlf. 327131 ella 283953



# Frá Happadráttinum

**Seinasti søludagur til 3. drátt er hósdagin 16. mai**



Størstu vinningar hesaferð:

| | |
|---|---|
| 1x | 250.000 kr. |
| 1x | 75.000 kr. |
| 1x | 60.000 kr. |
| 1x | 30.000 kr. |
| 2x | 25.000 kr. |
| 3x | 15.000 kr. |
| 7x | 10.000 kr. |
| 15x | 5.000 kr. |

Ágóðin av Happadráttinum: 1/3 fer til ÍSF og 2/3 fara í grunn, ætlað brekaðum

**Eykavinningur 15.000 kr.**

**Hin Føroyski Happadrátturin**

# TMJunior Várútsøla



Øll várvøra

**-40%**

byrjar mánamorgun 13/5 kl. 09.00

TMJunior
Vælkomin
Dr. Jacobsensgota 15
Tlf 311099
( við síðuna av Lampubúðini og Skálabúðini )

# Mammudagin

er blómuhandilin á Árvegnum
opin frá kl. 8.00



Vit hava framleitt alskyns prýðir á blómuverkstaðnum

**TRÓND HANSEN Sp/f**
Árvegur 3 • Postboks 116 • 110 Tórshavn
Tel. 31 27 02 • Fax 31 27 92

UNITED seafood

# Skrivstovufólk

Við hesum verður søkt eftir skrivstovufólki til Føroya Fiskavirking, Runavík, at byrja skjótast gjørligt.

**Krav er at umsøkjari hevur:**
- Skrivstovuútbúgving

**Fyrimun hevur umsøkjari, ið eisini hevur:**
- Góðan førleika í bókhaldi
- Kunnleika til teldunýtslu

**Vit kunna bjóða:**
- Eitt framkomið fakligt umhvørvi
- Eitt virkið og framkomið framleiðsluumhvørvi

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Elisabeth Djurhuus, tlf. 447054.

Umsóknin skal sendast áðrenn 14. mai 2002 til:

**UNITED SEAFOOD**
**P/F Føroya Fiskavirking Runavík**
att.: Elisabeth Djurhuus
Bryggjan
FO–600 Runavík

*Føroya Fiskavirking er eitt felag, sum í dag eigur 7 fiskavirkir.*

*Vit keypa fisk frá føroyskum skipum og bátum – at virka á okkara virkjum. Eisini keypa vit bæði feskan- og frystan fisk frá útlendskum skipum til virkingar.*

*Á virkjum okkara framleiða vit í dag:*
- *Frystar vørur beinleiðis til brúkarar í Evropa og USA*
- *Frystar vørur til matvøruídnaðin í Evropa og USA*
- *Feskar vørur beinleiðis til brúkarar í Evropa*
- *Feskar vørur til matvøruídnaðin í Evropa*
- *Saltfisk til brúkarar í Evropa*

*Fyri at tryggja góðskustøðið og matvørutrygdina eru á øllum virkjum okkara egnar góðskudeildir, sum framhaldandi kanna vøruna. Øll virkir okkara arbeiða eftir HACCP skipanini. Søludeild okkara er marknaðarrættað við høgum støði av serkunnleika viðvíkjandi vørukunnleika, -logistikki og - marknaði.*

*Krøv kundans verða sett í hásæti, eins og nøgdirnar av feskum-, frystum- og saltaðum fiskavørum, vit framleiða og selja, gera, at kundar okkara bæði í Evropa og USA meta, at teir altíð kunna fáa tørv sín nøktaðan best møguligt hjá okkum. Fiskasløgini, sum vit fyrst og fremst arbeiða, eru: Upsi, toskur, hýsa, svartkalvi og kongafiskur.*